# handVERKARIN

4. ÁRSFJÓRÐINGUR 2009 BLAÐ NR. 32 HAVNAR HANDVERKARAFELAG



# 60 ára føðingardagur hjá Havnar Handverkarafelag

*13. februar 2010 bjóða vit øllum limum v/maka til hugnaliga veitslu á Hotel Føroyum.*

*Freistin at tekna seg er 23. januar 2010. Kostnaður er 250,- kr. pr. persón.*

*Tekning fer fram við at gjalda á kontu 6460-1020155 í Føroya Banka. Upplýsast skal navn og føðingardagur.*

*Kvittanin er samstundis atgongumerki, sum skal vísast við hurðina.*

**Limaviðurskifti skulu vera í lagi.**

Havnar Handverkarafelag
Stoffalág 60 – Postboks 203
FO-110 Tórshavn
tlf. 35 48 00 Fax 35 48 01

## Innihald


| | |
|---|---|
| Tann rætti Robinson Crusoe | 3 |
| Lutir úr horni | 4 |
| Heimsins sjey undurverk | 12 |



**Útgevari:** Havnar Handverkarafelag • Stoffalág 60 • Box 203 • 110 Tórshavn
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eli Brimsvík
**Blaðstjórn:** Media • **Umbróting og prent:** Gramar
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
**Skrivstovutíð:** Mánadag til og við hósdag frá kl 9 til 15.
Tel. 35 48 00 • Fax 35 48 01 • Teldupostur: handverk@handverk.fo • www.handverk.fo

# Tann rætti Robinson Crusoe



*Oyggin, sum Ribinson Crusoe livdi á í góð 4 ár.*

Sum ein óvinnuligur virkismúrur liggur tann 20 kilometur langa oyggjin – sum seinni fekk heitið "Robinson Chrusoe oyggin" – o.u. 650 kilometrar vestanfyri Chile.

Einar 100 metrar frá strondini var eitt 3 metur høgt helli. Her var tað, at 28 ára gamli skotski sjómaðurin Alexander Selkirk leitaði sær til, eftir at hann í 1704 hevði mótmælt at sigla við slíkum plinsollara, sum hann hevði fingið hýru við, og revsingin fyri at mótmæla var, at teir settu hann av á einari ábygdari oyggj.

Síðan livdi hann har – fýra ár og fýra mánaðir – sum einabúgvi. Ein ótrúlig tilvera, sum seinni, tá ið hann var komin aftur í aftur fekk Daniel Dafoe til at skriva sína víðagitnu skaldsøgu "Robinson Crusoe".

Vit kunnu bert ímynda okkum, hvussu Alexander Selkirk hevur bønað og biðið tann náðileysa skiparan um ikki at seta seg einsamallan upp á hesa kletta-strondina; men alt til fánýtis.

Heilt frá sær sjálvum av ótta og vónloysi kannaði Selkirk, hvussu støðan var, og tað var skjótt gjørt, tí hann hevði bara eina byrsu við

**Framhald á síðu 23**

# Lutir úr horni



*Spónalag úr træi. Spónalagið varð m.a. brúkt til at gera súpuskeið við.*

Tá ið eitthvørt amboð skal gerast til brúks, er tað fyrsta, ið umræður, ráevni, sum dugir til endamálið. Í Føroyum hava í mongum førum horn komið væl við, bæði neytahorn og seyðahorn.

Hjá okkum hava horn verið nýtt til mangt; tað sama man hava verið í londunum rundan um okkum, t.d. verður sagt frá spónum, drykkjuhornum, krúthornum, snúshornum og mongum øðrum bæði úr Íslandi og frá Norðurskotsku oyggjunum.

## Neytahorn

Hjá okkum hava neytahorn verið nýtt til spønir, drykkjuhorn, hólkar, kambar, krúthorn, snúshorn, skreythorn, blóðkoppar, lyklaskelti og knappar.

At gera hornspønir er ikki hvørs mans føri, men summir vóru spónasmiðir burturav næstan. Spønir vóru altíð gjørdir úr neytahorni. Hornið varð klovið oman eftir miðjuni, ytri bogin av horninum varð nýttur til spón, og hin varð nýttur til skóhorn. Tá ið ytri parturin var toliliga væl hampaður, varð hann kókaður og settur í spenni í einum spónalag. Spónalagið varð klemmað saman við eini held.

Tá ið hornið er kalt, verður tað tikið úr aftur spónalagnum, sum ein ráur spónur. Hann verður síðan snøggaður, so hann fær sítt rætta skap. Tá ið hornið er kólnað eftir kóking og



*Kambar úr horni.*

forming, heldur tað skapið, tað hevur fingið, meðan tað var heitt.

Tá ið spónurin er gjørdur liðugur og hevur fingið sítt rætta snið, verður hann gjørdur skínandi blankur.

Á henda hátt verða hornlutir tilevnaðir, tá talan er um neytahorn.

## Spónir verða evnaðir til

Tá hornlutir verða evnaðir til skulu teir fyrst pussast við sandpappíri, til ongar skøvur síggjast eftir knívi, sag ella øðrum. Síðan verður pimpsteinur tikin upp í ein vátan ullintan klút, og pussað verður við hesum, til einki tekin sæst til sandpappírið. Tá verður aftur tikin ein ullintur, vátur klútur við trækolsmølvi og pussað verður við tí, til hornið er skyggjandi blankt og hevur fingið sín natúrliga lit. Til endans verður tikin ein vátur línklútur við grønsápu og einum sindri av wienarkálki; pussað verður við tí, til hornið er skínandi blankt. Tá heldur tað glansin og litin til allar tíðir.

Hesir spønir vóru bæði nýttir til at súpa allan súpimat og til at røra í krússunum við. Tað vóru gjørdir bæði smáir spønir og stórir, tespønir og súpispønir.

## Skóhorn

Hinum partinum av horninum, tí við minna boganum, ið nýttur varð til skóhorn, tørvaði ikki nógva viðgerð. Hann skuldi snøggast til hann hevði sín rætta form. Skóhornið skuldi eisini skýggjast á sama hátt sum spónurin. Eitt



*Spønir úr horni.*

slíkt skóhorn var sjálvandi at finna í hvørjum húsi, tá ið svartaskógvar vóru komnir í nýtslu.

## Drykkjuhorn

Drykkjuhorn vóru eisini gjørd úr neytahorni. Tey høvdu ymisk snið. Stundum var tað bert eitt horn, sum var skorið tvørturav sum ein kubbi við hóskandi hædd, og ein træbotnur varð settur undir.

Eisini kundi hornið vera gjørt meira prýðiligt, har tvey horn vóru nýtt, so at annað var stættur undir hinum, ið so var nýtt til at skeinkja uppí. Stættur og steyp vóru hildin saman við einum hólki, sum var festur í stættin við eini skrúvu; síðan varð steypið smoygt niður í hólkin, so at alt til samans var í javnvág, hvørt steypið var tómt ella fult.

## Hólkar

Horn vóru eisini nýtt sum hólkar um slíðrar. Slíðrarnir vóru gjørdir úr tveimum holaðum trælutum, og hólkarnir, tveir, tríggir ella fleiri vórðu settir um slíðrapartarnar til at halda teimum saman. Hetta vóru bæði sterk og vøkur bond um slíðrar. Eisini hava neytahorn verið nýtt til hólkar um leypsstuðlar, so teir skuldi ikki klovna ella slítast upp í nakka. Hetta kundi vera bæði á ovara enda og niðara, men tó mest á niðara endanum.

## Kambar

Neytahorn vórðu eisini brúkt til kambar, bæði grovkambar, tættkambar og prýðiskambar. Tá varð hornið fyrst flatað og evnað til; síðan varð tað sett í eitt kambalag, og tindarnir vórðu sagaðir út við fínari kambasag. Hesir kambar vóru sera nýtiligir og prýðiligir, men tá ið nýtt tilfar fanst, sum var lættari og skjótari at arbeiða við, vísti tað seg at vera ov torført og dýrt at gera kambarnar úr horni.

## Krúthorn

Tá ið krút fór at verða vanligt til nýtslu í byrsur, vóru eisini horn nýtt til at goyma krútið í. Hesi horn nevndust krúthorn. Tey vóru heil neytahorn, har sum ein træbotnur varð settur

í tann tjúkkara endan, og gjøgnum tann endan varð krútið latið í hornið. Í tí klænra endanum var eitt lítið hol við einum tøppi í til at lata krútið úr aftur horninum niður í byrsumúlan. Hetta horn høvdu menn stundum í reim um herðarnar, tá ið teir fóru at skjóta.

## Snúshorn

Snúshornið er ógvuliga líkt krúthorninum. Hetta nýttu menn til at goyma snús í. Føroyingar hava ikki snúsað so nógv í fornum døgum, og teir hava helst lært tað av Íslendingum, og haðani man helst hugskotið til snúshorn vera komið. Hesi horn vóru ofta væl pyntað við siseleringum og væl pussað. Snúshornið var gjarna minni enn krúthornið, tí tað var ætlað til at hava í lummanum, men tað hevði sama snið, hóast tað ofta var gjørt heldur flatari.

## Blóðkoppar

Blóðkoppar hava helst eisini verið nógv brúktir í Føroyum, tí tað finnast so mangir á Føroya Fornminnissavni. Teir vóru nýttir til at taka blóð við, og tað var gjørt til at lekja ymsar sjúkur. Kopparnir vóru gjørdir av klæna endanum á neytahorni. Allar ytsti endin var kubbaður av, so at eitt lítið hol var í øðrum endanum og eitt størri í hinum. Koppurin varð settur á húðina, har sum blóðið skuldi takast. Sogið varð úr klæna endanum so mikið, at har kom ein ljósur ringur eftir koppinum.

Skorið var við onkrum hvøssum mitt í hesum ringi, so tað blóðgaði; síðan varð koppurin settur aftur á aftur á sama stað, og sogið varð úr klæna endanum, so undirtrýst varð í koppinum yvir holið. Koppurin stóð so á, til hann var fullur og datt frá av sær sjálvum.




SPEKT løggildir grannskoðarar Spf.
spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

Staravegur 17 · Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn
Tel 34 34 34 · Faks 34 34 35

SPEKT løggildir grannskoðarar




*Pípa við pípuhúsa og eitt snúshorn úr horni.*

## Lyklarhol og knappar

Á skrínum og skápum eru lás, sum stundum hava horn til skelti um lyklarholið, og tað er ólíka vakrari enn tey vanligu messingarskeltini, sum altíð skulu vera væl pussað, um tey skulu líkjast nøkrum. Tað tørvar als ikki við hornskeltum, tí tey halda glansin allar sínar dagar.

Eisini hava neytahorn verið nýtt til knappar, tí tað hava verið tíðir, tá ið knappar gjørdir í útlondum fingust ikki til keyps ella vóru ov dýrir at keypa. Tað hevur tá verið ein góð hjálp at fáa smíðað sær knappar sjálvur, tá ið tilfarið kortini var fyri hond.

## Veðrahorn

Tá ið eitthvørt skal nýtast til amboð, og tað skal vera sterkt, so er veðrahorn óført gott tilfar. Tað hevur verið nýtt bæði til heldir og rakkar. Tá ið ein skal binda eina byrðu, stendur nógv á, meðan saman verður drigið bæði í langsnarinum og tvørsnarinum. Tá er heldin úr horni góð at hava.

## Heldin til rakka

Heldin varð eisini nýtt til at rakka; hon var bundin í ránna á bátssegli og smoygd niður yvir mastrina soleiðis at seglið skuldi ikki fara út frá mastrini, tá ið tað varð heysað ella lækkað. Varð seglið tikið heilt frá og rullað saman, varð rakkin loystur frá ránni. Rakkin virkar sum mastrarband á skupssegli. Heldir verða gjørdar soleiðis: hornið verður fyrst sagað til, so tað er toluliga skøffiligt. Í tann



*Krúthorn úr horni.*

breiðara endan verður gjørt eitt avlangt hol, og á hin endan verður gjørt ein tappur, sum gongur ígjøgnum holið. Á tappinum er eitt móthak, soleiðis at tappurin sleppur ikki út aftur, tá ið hann er fallin í holið.

## Hornið verður kóka

Horn er vanliga ógvuliga hart og stívt at arbeiða við, men verður tað kóka, er tað rættiliga lætt at benda, sum ein vil. Tá ið hornið hevur kókað eina løtu, verður tappurin stungin í holið, og ein ringur er komin burturúr. Heldin verður síðani sett í spenni, so hon verður rund. Soleiðis skal hon standa, til hon er heilt køld. Tá kann hon takast úr aftur spenninum, og hon heldur tað skap hon fekk meðan hon var heit. Síðan kann heldin snøggast við knívi, til hon er vøkur á útsjónd. Heldin missir ikki form sín, uttan so at hon verður heitað upp aftur. Rakkin er eisini ein held, og hann verður gjørdur á sama hátt.

## Veðurlambshorn

Úr veðurlambshorni kunnu eisini gerast slíkar heldir. Tær vóru nógv nýttar fyrr av smádreingjum, sum ikki tørvaði at hava so sterkar heldir, tí teir megnaðu ikki at draga byrðina so fast. Nú á døgum verða tær nýttar av konufólki til armband. Tað er vorðin ein móti at nýta slík armbond, tí tað er úr heilt natúrligum tilfari. Slíkt armband er eisini rættiligt prýði, tað er minst líka tekkiligt, sum hevði tað verið úr gulli ella silvri.




*Slíðrin, ið er lagdur við horni.*

## Stangarhorn

Eisini verða veðrahorn nýtt til stangarhorn á fleygastong ella fyglingarstong, tí tey skulu eisini vera sterk. Stangarhornið er gjørt úr innari útsíðuni á veðrahorninum. Tað hevur eitt avlangt hol í miðjuni, ein tappur á endanum á stongini verður smoygdur út í hetta holið. Úti ímóti báðum endunum á horninum eru hol, sum stangararmarnir skulu ganga ígjøgnum. Síðani verða armarnir bundnir aftur at stongini longri niðri, soleiðis at teir gleiva nakað hvør frá øðrum, so teir saman við netinum skapa ein glúp til at fanga fugl í. Stangarhorn er ógvuliga sterk og skal eisini halda til nógv, tí nógv stendur á, tá ið stongin verður nýtt.

## Hornaklingra

Eisini vórðu horn nógv nýtt at spæla við hjá børnum. Tey spældu javnan við horn, sum vóru ótilgjørd; men tey kundu eisini gera sær hornaklingrur. Ein hornaklingra er sett saman av 4-5 veðurlambshornum soleiðis, at stinkulin á einum horni verður settur inn í opna endan á einum øðrum horni, so ein ringur verður gjørdur á henda hátt. Til at fáa hornaklingruna saman, so hon verður rættiliga føst, er best at verma hornini fyrst, áðrenn saman verður sett. Tá ið tey so kólna aftur, halda tey tað runda skapið. Skemtiligt var mangan at spæla við hornaklingrur; tað galt um at hava eina, sum rann beint og skjótt

## Smábarnakoppur

Børn, ið ikki fingu nóg nógva mjólk frá mammuni, fingu neytamjólk úr koppi, ið var gjørdur úr horni, helst einum stórum veðurlambshorni. So mikið var skorið av stiklinum, at eitt hol so vítt sum gásarfjøður var í endanum. Í hetta hol varð sett fjøður við rótendanum úteftir. Lítið hol varð sett á fjaðrabotnin, so at barnið soleiðis fekk sogið mjólk úr koppinum. Klædnaskeyti ella roð varð vavt um fjøðrina uttan fyri hornið og bundið fast við bandi í eina skoru ú



*Ein ristari, ið varð nýttur í sambandi við torvskurð. Eitt veðurlambshorn er fest í endan.*

horninum. Hetta var nýtt í staðin fyri fløskuna.

## Lampustettar

Í seinnu tíðum havi eg sæð menn gjørt lampustettar úr horni. Tá verður hornið sett við opinum uppeftir og boganum niður. Lampusporið verður stoytt við gipsi fast niður í opið. Leidningurin gongur inn gjøgnum botnin á horninum. Her havi eg bara sæð nýtt veðrahorn.

## Tuflur

Tuflur, ið vóru gjørdar við træbotni, hildu ikki langar tíðir tí botnurin sleitst skjótt upp. Tað galt tí um at hava okkurt slítsterkt undir botninum. Tá hava teir evnað sær hornplátur til at leggja uppundir. Hesar hornplátur vóru ógvuliga sterkar í sliti, men eitt ilt var við teimum: tuflurnar vóru ógvuliga hálar at ganga í frosti og kava.

## Seyðahorn ikki blankast

Føroyingar hava gjøgnum tíðirnar havt nógv gagn av hornum, bæði av neytahornum og seyðahornum til ráevni. Seyðahornini hava tað við sær, at tey kunnu ikki blankast og pussast sum neytahornini, tí tað er ov bleytt tilfar í teimum til tess. Skulu seyðahorn síggja so væl út sum møguligt, skulu tey vaskast væl við grønsápu í køldum vatni og síðan blakast við litleysum skókremi. Tað tykist at vera tað frægasta blankievni til seyðahorn. Tey eru ov opin til at kunna skýggjast sum neytahorn.

# Heimsins sjey undu



*Taj Mahal, soleiðis sum tað oftast er avmyndað.*

Tann fyrsti at gera ein lista við sjey bygningsverkum, sum hann nevndi "Heimsins sjey undurverk" var grikkin Antipater úr Sidon, sum livdi u.l. ár 150 f. kr. Hann ferðaðist víða um í tí - tá kenda heiminum - og skrivaði drúgvar frásagnir um sínar ferðir. Tað er út frá tí, sum hann sá og hoyrdi um, at hann ger sín lista við 7 bygningsverkum, sum hann metti vóru tey mætastu í heiminum, og tí gav teimum heitið "Heimsins sjey undurverk".

Seinni eru onnur, sum hava gjørt aðrar listar, - tað venda vit aftur til.

At undurverkini hjá Antipater vóru avmarkað til 7 hevði helst sama týdning, sum 7 talið hevur í okkara ævintýrum. Har eru sanniliga undur.



*Taj Mahal, í sínum umhvørvi.*

Fyrsta undurverkið á listanum hjá Antipater er “Halikarnassos Gravtemplið” (u.l. ár 356 f.Kr). Nr. 2: “Artemistemplið í Efesos” (u.l. ár 550 f.Kr). Nr. 3: “Hangandi havarnir í Babylon” (u.l. ár 600 f.Kr.) Nr. 4: “Zeus standmyndin í Olympia” (u.l. ár 450 f.Kr). Nr. 5: “Kolossurin á Rhodos” (u.l. ár 305 f.Kr.) Nr. 6: “Vitaverkið við Aleksandria”, og at enda “Keopspyramidan í Egyptalandi” (u.l. ár 400 f.Kr.).

Tað einasta av hesum 7 undurverkum, sum enn stendur uppi, er Keopspyramidan.

Ætlanin við hesi grein var ikki at siga meira um undurverkini hjá Antipater. Vit fara heldur at nevna ein annan lista, sum ikki er so gamal. Hann fevnir um 7 bygningsverk, sum øll eru varðveitt og, sum hava eina áhugaverda søgu. Um tey ikki eru undurverk, so bera tey kortini orð fyri at vera tað.

## Taj Mahal í India

Tað verður sagt um “Taj Mahal” í Norðurindia, at tað er vakrasta bygningsverk, sum skapt er av mannahond.

Eins og Keopspyramidan er “Taj Mahal”, eitt gravminnið. Mong meta Keopspyramiduna at vera eina roynd hjá Keops at skapa sær sjálvum ein ævigan minnisvarða. Tað sama kunnu vit ikki siga um Taj Mahal, sum var bygt árini 1632-1648.

Um Taj Mahal verður sagt, at tað er ein kærleiksfagnaður til hjúnarlagið, og ein roynd at ódeyðiligera eina av heimsins lukkuligastu kærleikssøgum.

Í einum samfelag har loyvt var at hava fleiri konur gav skapari Taj Mahal, Shah Jahan, allan sín kærleika til eina einastu kvinnu, sum nevndist Mumtaz Mahal.



*Potala í Nepal hevur í øldir verið bústaður hjá Dalai Lama, sum er andligur leiðari hjá milliónum av buddistum.*

Tá hon doyði í barsilssong í 1631 við 14. barni teirra var Shah Jahan so meint raktur av sorg, at hann brúkti meginpartin av orku síni, og ein stóran part av landsins ríkidømi, til at byggja Taj Mahal til minnis um elskaðu konu sína.

## Dreymakent

Í frástøðu tykist Taj Mahal dreymakent – og so ótrúliga vakurt, at mangur hevur spurt seg sjálvan, hvussu menniskju hava verið før fyri at skapa eitt so ævintýrkent verk úr tungum køldum marmorsteini.

Í hvørjum horni kneysa tey 4 sjáldsama vøkru spírini – og alt, bæði innan og uttan er so framúrskarandi, at tað ikki er lætt at greiða frá. Bæði í høvuðsgravkamarinum, og í teimum átta smærru rúmunum, eru veggirnir prýddir við blómum av skínandi gimsteinum viðíløgdumhvítummarmori.Íbyggiarbeiðinum luttóku 20.000 mans, og ikki minni enn 1.000 indiskir elefantar vóru brúktir til at draga byggitilfar til byggiplássið.

Arkitektur var Ustad Ahmad úr Pakistan. Umframt hann luttóku eisini serfrøðingar á mongum økjum úr Evropa og Miðasia.

Tá ið Shah Jahan doyði, var hann gravlagdur undir liðini á einastu konu síni Mumtaz Mahal.

## Potala í Nepal

Bygningurin, sum nevnist Potala (á myndini omanfyri) í høvuðsstaði Tibets, Lhasa, verður víðahvar í Asia eisini nevndur "Gudanna Palass". Potala hevur í øldir verið bústaður hjá Dalai Lama, sum er andaligur leiðari hjá millionatals buddistum. Dalai Lama hevur haft støðu sum kongur í Tibet, og Potala hevur verið búsetur hansara. Lhasa hevur verið av-

byrgdur frá umheiminum í øldir og bert fáir vesturlendingar hava vitja í Potala.

Potala breiðir seg upp eftir brattari fjallasíðu, upp í tindin á fjallinum. Tey, sum hava vitjað í Lhasa siga, at bygningurin tikist at vera vaksin upp úr sjálvum klettinum.

## Stórt palass

Palassið er 135 metrar høgt og 275 metrar langt; ikki færri enn 1.400 rúm eru í bygninginum. Tann høga framsíðan, við nógvu hæddunum, lýsir í klárum hvítum og reyðum litum, og krýnist av gyltum kuplum. Salirnir eru fyltir við ómetaligum dýrgripum savnaðir ígjøgnum øldir.

Tað var tann fimti Dalai Lama, sum í 1641 fór undir byggja Potala; 50 ár tók tað at fullføra verkið.

Á várið 1959 gjørdu kinesiskar herdeildir sniðálop á Tibet, og tóku ræði í øllum landinum. Tá útnevndu kinesarar Tibet til landslut í Kina.

Í evstu løtu eydnaðist, tí núverandi Dalai, at flýggja úr palassi sínum til India, har hann síðani hevur búleikast.

Núverandi Dalai Lama er tann 14 í røðini. Upprunaliga er hann bóndasonur og nevndist Tenzin Gyatso. Lat okkum eisini nevna, at Tenzin Gyatso fekk friðarheiðursløn Nobels í 1989.

## Panamaveitin

Í fleiri øldir høvdu fólk og landastjórnir droymt um eina sjóleið, ið kundi binda saman Atlantshavið og Stillahavið, tvørtur um tann 80 kilometur breiða Panamaslættan.

Longu í 1534 kannaði týski keisarin Karl fimti, sum eisini var kongur í Spania, um tað var møguligt at gera eina siglingarveit á staðnum, so siglast kundi úr Atlantshavinum tvørturum Panamaslættan beinleiðis yvir í Stillahavið.

Men eftirmaður Karl fimta á sponsku trónuni, Filip annar, hevði ongan hug at fara undir ætlanina. Hann metti at trupulleikarnar, sum verkfrøðingar vístu á, vóru alt ov umfatandi. Hann skal eisini hava sagt, at ætlanin var "ímóti Guds vilja.

## Fyrsta royndin

Í 1880 átók eitt franskt felag, undir leiðslu av fransmanninum Ferdinant de Lesseps, sær at gera Panamaveitina. Ferdinant de Lesseps hevði staði á odda, tá Suez veitin var grivin, og var kendur fyri bragdi, sum Suez Veitin var mett at vera.

Tá fransmenn fóru til verka gjørdist skjótt greitt, at her vóru trupulleikar, sum ikki var roknað við frammanundan. Fyrsti stóri trupulleikin, ið tók seg upp vóru mongu lívshóttandi sjúkurnar, sum raktu arbeiðsfólkið. Talan var um sjúkur, sum t.d. kolera, malaria, gulur fepur og pest. Fyri hesar sjúkur fanst tá ongin grøðandi heilivágur. Og lendið var eisini ein stór plága í nógvar aðrar mátar. Har var hópur av eitrandi slangum, flogkyktum, mórudíkjum, kyksendi, flóðaldum og jarðskjálvtum. Arbeiðsfólkið var eisini plága av skriðulopum, ið kundu taka meira enn 55.000 rúmmetrar av mold og fjala hús, jarnbreytir og gravimaskinur í hópatali. Vanliga tók tað arbeiðsfólkinum fleiri vikur at rudda upp eftir slík skriðulop. Mett var at 21.900 mans lótu lív, tá fransmenn stóðu fyri arbeiðinum.

Tað vóru túsundtals franskir smásparar, ið fíggjaðu verkætlanina hjá Ferdinant de Lesseps, ið endaði sum ein av heimsins størstu gølum, tá verkætlanin fór á húsagang. Fyri at bjarga tí, sum bjargast kundi var eitt annað felag stovnað, men eisini tað miseydnaðist.

## USA kemur upp í leikin

Í 1902 eydnaðist at selja verkætlanina til USA fyri 40 milliónir dollarar, sum tá sjálvandi var ein risa upphædd.

Men amerikanarar vóru nøgdir við



*Empire State Building í New York.*

handilin, og við forsetanum Teddy Roosvelt var við góðum hugi farið undir arbeiði at knýta saman Atlantshavið og Kyrrahavið.

Amerikanarar mettu sjálvandi ikki at hetta fór at vera ein stórvegis trupul uppgáva, men ongantíð áður hevur ein byggiætlan rent seg í so nógvar forðingar.

Tá verkætlanin var liðug var mett at umleið 27.500 arbeiðsmenn høvdu latið lív frá tí, at fransmenn byrjaðu arbeiðið til veitin var liðug í 1914.

## Empire state building

Helst er onkur, sum heldur lítið um háhús og tí spyr, hví hesin bygningur skal nevnast her. Onkur annar hevur hug at siga, at ein bygningur, ið einans er 102 hæddir er lítið av miklum ímóti háhúsunum, sum verða bygd í dag. Øll minnast Worl Trade Center, sum var 110 hæddir. Jú rætt er tað, men Empire State Building er kortini í eini serstøðu. Millum annað var hann heimsins hægsta hús í 40 ár, og onki annað hús í heiminum er so væl vitjað, sum hesin bygningur. Umleið 1½ mió. fólk fara á hvørjum ári inn í elevatorarnar fyri at sleppa so langt upp sum gjørligt; bygningurin er 448,5 metur høgur. Tey sum hava roynt túrin upp á ovastu hædd og hava notið frálíka útsýnið siga, at tað er ein serliga stór løta. Eftir álopið á Worl Trade Center gjørdist ESB aftur hægsti bygningur í New York.

## Stór tøl

Tá talan er um Empire State Building í New York eru nógv stór tøl at nevna. Tilfarið í bygninginum vigar um 330 túsund tons. Bygningurin er sum ein býur í býnum; hann veitir sínum 16.000 leigumálum allar hugsandi tænastur sum t.d. eitt stór tal av bankum, matstovum, vøruhúsum og ferðamannastovum.

At flyta fólkið upp og niður í bygninginum eru 73 elevatorar og 4 rullandi trappur.

Í bygninginum eru 5.600 kilometrar av telefonleidningi. Til el eru 750.000 metrar av el leidningi. Til reingerð og viðlíkahald av bygninginum eru 400 fólk í føstum starvi.

Og at enda kunnu vit nevna, at í bygninginum eru 6.500 vindeygu at halda rein.

## Pæturskirkjan

Umframt tað, at Pæturskirkjan í Rom byggifrøðiliga er eitt tað mest undurfulla bygningsverkið frá renesansutíðini, so er hon eisini eitt tað kendasta í kristna heiminum.

Pæturkirjan er bygd soleiðis at hon formar ein kross. Langskipið er um 200 metrar langt, meðan tvørskipið er 137 metrar. Tann stóri kupilin er 132,5 metrar høgur. Øll kirkjan er 3,6 hektar stór, og er heimsins størsta kirkja. Tað verður sagt, at undir altarinum, hvíla jarðisku leivdirnar av tí eyðmjúka fiskimanninum, sum Jesus leit "himmiríkis lyklar" upp í hendi. Tann upprunaliga Pæturskirkjan varð bygd á júst sama staði um ár 300 e.Kr. eftir boðum frá



*Pæturskirkjan í Róm..*

Konstantin keisara. Henda kirkjan stóð uppi í 1200 ár, tá var hon so mikið illa farin, at Julius annar pávi gjørdi av at taka hana niður og byggja eina nýggja á sama staði.

## Skapt av flogvitum

Núverandi Pæturskirkjan er fyrst og fremst skapað av so stórum úrmælingum, sum arkitektunum Bramante, Madero og Bernio, og myndahøggaranum og listamálaranum Michelangelo og Rafael, sum allir verða mettir sum sonn flogvit.

Ein heiður fyri, at kirkjan gjørdist veruleiki eiga 20 ymiskir pávar, sum livdu í 1500 og 1600 talinum, tá meginparturin av arbeiðinum var gjørt, í tilsamans umleið 120 ár.

Mett verður, at í okkara peningin kostaði arbeiði umleið tvær milliardir krónur.

Sjálvt um mangir katolikkar sóu hetta sum "pávaliga vandalismu", og hóast tað valdaði eitt áhaldandi stríð millum arkitektarnar og listamennirnar, ið sótu við ábyrgdini, so kundi tann nýggja kirkjan umsíðir vígast í 1626.

Síðani kirkjan var vígd hava nógvar milliónir fólk vitja í Pæturskirkjuni, og enn er kirjan karmur um eina tað størstu kirkjuligu hendingina í kristna heiminum, tá sjónvarp um allan heim senda beinleiðis gudstænastu úr kirkjuni á jólum.

Kendi enski søgufrøðingurin, Edvard Gibbon, lýsir kirkjuna sum "tann glæsiligasti bygningurin, ið nakrantíð er vígdur kristindóminum".

## Kinesiski múrurin

Kinesiski múrurin er eisini kendur undir heitinum "Tann stóri múrurin". Farið var undir at byggja múrin í seinna pari av 13. talinum. Seinasti parturin var bygdur í byrjanina av 16. talinum. Múrurin varð ikki bygdur sum ein samanhangandi eind; hann var bygdur í brotum. Lat okkum eisini nevna, at frammanundan vóru bygdir smærri múrar við kinesiska markið.

Arbeiði var gjørt meðan sonevnda "Ming-Dynastiið" hevði ræði í Kina. Endamálið var at



*Kinverski múrurin, ið sambært rúmdarmonnum, er einasta mannaskapta verk á jørðini, ið sæst úr rúmdini.*

verja Kina ímóti álopum frá mongolskum og turkiskum ættarbólkum.

Samlaða longdin verður mett at vera um 8.851 km. Tilfarið í múrinum er grót, eyrur og mold.

Hæddin á múrinum skiftir frá 4,5 til 15 metur; breiddin frá 4,5 til 9 metur.

Uppiá múrinum er ein vegur, sum er vardur við múrum uppi á múrinum. Við jøvnum millumbili eru bygd torn til vaktarhald; tey eru tilsamans eini túsund í tali.

Múrurin varð bygdur av trælum, sum nógvir lótu lív undir arbeiðinum. Teir vóru - í stórum tali - jarðaðir inni í múrinum, og tí verður kinesiski múrurin eisini nevndur "heimsins longsti kirkjugarður". Mett verður, at um ein millión mans luttóku í arbeiðinum at byggja múrin.

Kina hevur ótalligar ferðir verið hertikið av fíggindum, og tí kunnu vit ikki siga at Kinesiski múrurin hevur verið við til at hildið allar fíggindar burtur. Men lat tað eisini verða nevnt at múrurin hevur í mongum føri helst verið avgerandi orsøk til at kinesarar hava vunnið á sínum mótstøðumonnum.

Í dag eru partar av múrinum friðað øki, og flestu ferðafólk, sum vitja í Kina ynskja at síggja múrin. Tí verða eisini nógvir túrar gjørdir til múrin, og ferðafólk fáa høvi at spáka sær ein stuttan túr á múrinum.

Lat okkum enda nevna, at fleiri rúmd-armenn hava greitt frá, at tað einasta, sum kann kennast aftur, tá ferðast verður kring jørðina, er Kinesiski múrurin.



www.ns.fo
GRAFIA
spar2
Alt gerst lættari...
Nú eisini galdandi fyri Mac teldur!
Nýggj víðkað útgáva av spar2
• Tú kanst gera uttanlandsflytingar (SWIFT flytingar)
• Tú kanst keypa og selja virðisbrøv
• Tú kanst bíleggja kort
...og mangt annað!
Norðoya Sparikassi Ósávegur 1 Postboks 149 FO-710 Klaksvík Tel. 475000 Fax 476000 ns@ns.fo www.ns.fo




mazda
Tann nýggi 6'arin er komin
SENDISTOVAN
ZOOM-ZOOM
mazda 6
Bilasølan
www.mazda.fo

# Ein depil innan skipatænastur

www.mest.fo

At smíðja, umvæla og umbyggja skip og verksmiðjur er okkara avbjóðing.

Men **MEST** er eisini so nógv annað.

**Vit bjóða m.a.**

- Serkøn fólk og vælútgjørdar smiðjur
- Landsins størstu goymslu av eykalutum
- Projekt- og teknistovuarbeiði
- Stórar bedingar og turrdokk
- Leigu av sleipibátum og kranum
- Titringsmátingar (vibratiónsanalysur)






MEST

**MEST**
P.O. Box 65
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 30 11 00
Fax +298 30 11 01
info@mest.fo
www.mest.fo

Vegurin Langi · Postboks 3309
FO-110 Tórshavn · tel 345 000
fax 345 001 · www.balslev.fo
balslev@balslev.fo

BYGMA
BALSLEV



# Inventar Tænastan

www.inventar.fo - Tel. 353800








## Eitt trygt grundarlag

Articon hevur serligan førleika innan jørð-, kloakk-, betongarbeiði, byggibúgving, vega- og havnagerð, fjarhita, timbur- og snikkaraarbeiði eins og ymisk apteringsarbeiði, tá skip verða bygd ella umvæld. Men vit kunnu standa fyri ella vera partur av so at siga øllum verkætlanum ella byggiarbeiði so sum skrivstovubygningar, verksmiðjubygningar, goymsluhallir, umvæling og umbygging.

ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · articon@articon.fo · www.articon.fo



FØROYABANKI

# Nýggj kundatænasta á telefon 330 330

**Kundatænastan er títt beinleiðis samband við bankan, har vit veita tær tænastur skjótt, greitt og uttan umstilling.**

**Í Kundatænastuni fært tú altíð samband við bankafólk, ið er til reiðar at avgreiða tíni ørindi skjótt og greitt. Tær nýtist sostatt ikki at bíða eftir tínum ráðgeva. Um tú hevur ørindi, ið krevja ráðgeving, stilla vit teg sjálvandi um.**

**www.foroya.fo**

SENDISTOVAN

# Tann rætti Robinson Crusoe

*Framhald av síðu 3*

krúti og kúlum, eina øks, ein knív og eina kókigrýtu. Harumframt hevði jann eina skipskistu við klæðum, tubbaki, nøkur navigatiónstól og eina bíbiliu.

Hann fekk ongan proviantur við sær.

Alexander Selkirk leitaði sær skjól í einum helli; men tað var bæði skjótt og brátt, at hann varð vaktur upp úr svøvni av teimum ýlandi sjóleyvunum, sum bardust sínámillum niðri á strondini. Fyri at sleppa undan hesum levindinum fór hann til gongu knassandi viðføri sítt á bakinum. Uppi á fjallinum gingu geitir á beiti, og tær komu at vera hansara bjarging ta fyrstu strævnu tíðina.

Viðvíkjandi geitunum, var tað soleiðis, at ein matrósur, Juan Fernández, í 16. øld hevði ætlað at búseta seg á oynni. Tað bleiv tó bert eitt stutt "ævintýr", men tær geitirnar, sum blivu verandi á oynni, eftir at hann var farin av henni aftur, tær nørdust og komu mangari skipsmanning væl við. Alexander Selkirk innrættaði sær ein bústað í einari brekku, har hann hevði gott útsýni, og teir næstu mánaðirnar hugdi hann dag um dag út yvir havið eftir seglum, sum kortini ongantíð vístu seg.

Eins og Robinson Crusoe í skaldsøguni, fór Selkirk niður í fullkomið troystarloysi. Hann hevði bara deyðan at síggja fram til og kom nú at iðra seg um ungdómssyndir sínar sum t.d. tá hann einaferð var komin í bardaga úti á gøtuni og alment hevði fingið ábreiðslu fyri tað av prædikustólinum í skotsku føðibygd síni Largo.

Nú las Selkirk hvønn dag í Bíbliu síni og bað til Guð hvørt kvøld. Og meðan hann reikaði runt uppi í fjøllunum, sang hann teir sálmarnar, sum hann kundi minnast.

Reinlynta trúgv hansara fekk tunglyndið at hvørva, soleiðis at hann føldi eina vaksandi gleði við ta undurføgru náttúruna, hann var umgirdur av, og hon var honum til størri og størri ugga í einsemi hansara.

Tað gav honum nýggja lívsvón, ið fekk hann til at gera tvær smáttur úr viðarbulum av ungum pipartrøum.

Onnur var ætlað til setstovu og hin sum køkur. Hann bygdi tær so mikið fjaldar, sum gjørligt, so tær ikki vóru lættar at koma fram á. Í skaldsøguni hjá Defoe óttaðist Robinson





mannaátarar, men Selkirk var mest bangin fyri spaniólum, tí Ongland og Spania vóru tá í kríggj, hvørt móti øðrum.

Í fyrstani var Selkirk illa plágaður av rottum, sum gnagaðu bæði føtur hansara og klæði, meðan hann lá og svav. Tær vóru komnar til oynna við ymiskum skipum, og høvdu nørt seg óhugnaliga nógv, men til alla lukku høvdu sjómenn eisini sett nakrar kettur á land, og tær vóru nørdar so mikið at Selkirk skjótt fann eina natúrliga loysn viðvíkjandi rottu-pláguni.

Kapteynurin Woodes Rogess, ið seinni bjargaði Selkirk, greiðir frá hvussu hann fóðraði ketturnar við leskiligum geitakjøti, og fekk tamt tær, soleiðis at tær í hundraðvís tirptust um smátturnar hjá honum og at enda beindu fyri rottunum. Hann bleiv við tíðini so glaður fyri ketturnar, at hann stuttleikaði sær við at læra tær dugnaligastu kettlingarnar at dansa.

Kosturin hjá Selkirk var fyri mestapartin geitakjøt, júst sum hjá Robinson Crusoe. Skjaldbøkur og fisk toldi hann ikki væl fyri maganum, men harafturímóti kundi hann njóta eitt serligt slag av hummara – klógvaleyst – sum nú er høvuðssinntøkukeldan hjá oyggjabúgvunum. Pálmafruktir nýtti hann í staðin fyri breyð, og seinni fann hann bæði røtur, radisur og pastinakk-vøkstur, sum fólk úr kaparaskipinum høvdu plantað langt fyri hansara tíð.

Mjólk fekk hann frá geitunum. Tá ið klæðini við tíðini blivu meira slitin og kloddut, fann hann uppá at gera sær ermur av geitaskinni. Tað var skjótt, at krúti til byrsuna fór at ganga undan. Hann vandist skjótt við at klúgva og renna, og skjótt var tað ikki nakar trupulleiki hjá honum at ganga skóleysur.

Til samans fekk hann lívið av eini 500 geitum, meðan hann var á oynni.

Woodes Roger kapteynur, sigur at meðan bjargingarfólkini vóru á oynni, feldi Selkirk dagliga fleiri geitir, sum blivu steiktar á báli og sjálvt skipshundurin kundi ikki fylgja við á veiðuferðunum. Eina ferð tá ið hann kastaði seg eftir einum geitabukki, var hann so óheppin at detta við bukkinum oman gjøgnum ein bratta og kom at liggja við ongum viti í 24 tímar. Hóast nógva pínu kláraði hann at grulva heim aftur í smáttu sína.

Hann hevði frammanundan verið so fyrivarin – um hann skuldi verðið sjúkur – at temja sær nakrar geitir at hava sum húsdýr, so at hann altíð kundi skaffa sær til matna. Tá tíggju dagar vóru farnir var hann komin fyri seg aftur.

Tey gott fýra árini hann var á oynni, áðrenn Rogers kapteynur kom hagar, høvdu bara tvey onnur skip verið har. Bæði komu í senn, og tá var um reppið, at hann var tikin á bóli. Hann hevði verið óskettin og onkur hevði sæð hann. Talan var um sponsk krígsskip, og teir jagstraðu hann og skutu eftir honum. Men hann var so mikið skjótur og heppin, at hann slapp frá

teimum.

Tað staðið sum í dag rópast "vaktar-staður Selkirks", liggur uppi millum tveir fjallatindar.

Tað tekur umleið tveir tímar at ganga niðan hagar. Niðan komin sær man í norðan, vestan og landsynning, so langt eygað røkkur. Her uppi sat hann mánað eftir mánað og hugdi eftir skipum. Men tey fáu sum hann bar eyga við, lótu antin sum onki ella sóu tey ikki neyðbluss hansara og sigldu sína kós. Soleiðis gingu árini líka til Selkirk seinrapartin 1. februar 1709 bar eyga við tvey seglskip, ið stevndu beint inn á víkina. Hann helt til beins oman til strandar og fekk kynt eitt bál. So settist hann at bíða fyri náttina. Um borð á teimum báðum kapraraskipunum "Duke" og "Dutchess" bóru teir ótta fyri, at onkur ætlaði at lokka skip teirra inn í eina fellu, so tey hildu sær úti á líka til kapteynurin um middagsleitið sendi ein bát í land fyri at kanna, hvat var á vási.

Teir átta vápnaðu sjómenninir stóðu sum negldir, tá ið teir sóu tann skeggjuta mannin, ílætin loðin geitaskinni, og "sum sá enn villari út enn tað dýrið, ið hevði havt skinni áðrenn hann". Tá ið Selkirk var komin umborð á "Duke" bleiv Rogers kapteynur greiður yvir, at einabúgvin hevði gloymt móðurmál sítt í so stóran mun, at vit høvdu ilt við at skilja tað, hann segði. Av tí, at hann segði øll orð sundurskyld. Meðan manningin brúkti einar tíggju dagar til at proviantera og bøta seglini aftur, fortaldi Selkirk sína ótrúligu søgu fyri Rogers, sum so hvørt skrivaði hana í loggbókina. Rogers útnevndi Selkirk til annan stýrimann helst tann fyrsti skóleysi stýrimaður, hann nakrantíð hevði havt. Men Selkirk hevði eisini fingið so harða húð, at hann leingi ikki toldi at ganga í skóm. Tá ið skipini vóru klár, løgdu tey aftur í havið – hesa ferð sigldu tey norður eftir at jagstra fíggindaskip. Selkirk fekk ræðið á tí næsta spanska skipinum, teir kapraðu.

Í 11 mánaðir sigldu Rogers og fólk hansara úr Chile til Mexico og hertóku øll før, teir kundu fáa fatur á, við einum fongi, ið seinri var mettur til knappar 15 milliónir krónur.

Síðan fóru teir í ein vestan og komu á tann hátt jørðina runt á reisuni heim.

Um miðjan oktober 1711 setti Selkirk umsíðir fótin á land nærhendis London – ikki sum ein "neyðardýr", men sum ein holdin maður, ið hevði forvunnið sær ein góðan neva á kaparasjóferðum sínum.

Tað var ein sunnumorgun, at Selkirk kom aftur til føðibygd sína Largo í greivadøminum Tife.

Tað fyrsta hann gjørdi var at fara í kirkju.

Øll stardu at hesum stásiligt klædda fremmandamanni í gull-broderðaum búna. Ongin kendi hann ta fyrstu løtuna – heldur ikki bróður hansara og foreldrini. Men so við eitt leyp mamman upp og nevndi hann við navni og hálsfevndi tann sonin, sum hon fyri langt síðan hevði hildið verið deyðan.

Hóast hann var heimafturkomin gjørdist lívið ikki minnið trupult enn tað hevði verið frammanundan. Hann dámdi best at vera einsamallur.

Hann var einsamallur úti í fjøðrinum ella gekk langar túrar eisamallur í skóginum, og tað var ikki so sjáldan, at hann hevði fyri munni



“mín elskaða oyggj – eg vildi ynskt, at eg aldrin hevði forlátið teg.”

Ein dagin stakk hann av til London saman við dóttur grannan, Sophia Bruce. Men hon var ikki før fyri at bera hansara friðleysa lyndi í longdini, og tvey ár eftir meldaði hann seg til herflotatænastu.

Seinri gjørdist hann fyrsti stýrimaður á “H.M.S. Weymourth” og doyði har á einari ferð vestan fyri Afrika bara 45 ára gamal.



Meðan hann var staddur í London vóru almanna kunngjørdar tvær frásagnir um einabúgva tilveru hasnara á lítlu oynni. Hann bleiv skjótt ein viðgitin maður.

Ta fyrstu frásøgnina hevði Rogers kapteynur skrivað, og hon vakti miklan ans beinan vegin. Og árið eftir skrivaði sir Richard Steele eina grein í bløðini. Seks ár seinni í 1719, kom so skaldsøgan, Robinson Crusoe hjá Daniel Defoe. Hon fekk sera góða móttøku við tað sama.

Ensku lesararnir vóru straks varnir við líkleikan millum upplivingarnar hjá Selkirk og tær hjá Robinson Crusoe í skaldsøguni hjá Defoe. Hansara oyggj skuldi liggja nær munnan í Ornoco ánni uttan fyri strondina í Venezuela, men har var so ongin oyggj í veruleikanum – so tað var týðuligt, at Defoe hevði lagt sína oyggj soleiðis, at hon ikki kundi staðfestast.

Nú á døgum eitur oyggin hjá Selkirk “Robinson Crusoe-oyggin ”.

Hagar ber til at fara við flogfari til Santiago í Chile og so víðari við ferju út á oynna. Har eru góð gistingarhús og skipað verður fyri áhugaverdum útferðum – serliga til tey støðini har hetja teirra vanliga helt til.

Men einsemi, sum Alexander Selkirk gjørdist bundin av er ikki møguligt at uppliva á oynni í dag. Oyggin er vorðin eitt væl umtókt ferðamál.





## Lat heldur okkum gera tað...

Húsavarðartænastan er altíð klár. Vit gera tímasáttmálar ella heildarloysnir til virkir og stovnar, har vit altíð eru til reiðar at gera umvælingar ella aðrar uppgávur – alt samdøgrið.

**...húsavarðaarbeiði**
**...alt snikkara- og timburarbeiði**
**...umvælingar**
**...sethúsabygging**

Tel 565589 - 565590
hvt@kallnet.fo, Fax 315590

**Húsavarðartænastan**

**Ognað tær tín egna húsavørð**

# TEKNISKI SKÚLIN Í TÓRSHAVN

.... SKAPANDI UMHVØRVI

## EIN VIRKIN OG GÓÐUR SAMSTARVSFELAGI



EIN SKÚLI, IÐ GEVUR GÓÐA OG SAMANHANGANDI UNDIRVÍSING, Í TØTTUM SAMSTARVI VIÐ VINNU OG LÆRLING

- VIT SETA LÆRLINGIN Í MIÐDEPILIN
- VIT NØKTA TØRVIN HJÁ VINNUNI
- VIT HAVA HØGAN NÁMSFRØÐILIGAN OG FAKLIGAN FØRLEIKA

TEKNISKI SKÚLIN Í TÓRSHAVN, POSTRÚM 3239, 110 TÓRSHAVN .TLF. 738050 . WWW.TST.FO . T-POSTUR TST@SKULIN.FO





demich
hiti | vatn | sanitet
Grønar orkuloysnir frá Demich
Nú er nýggja hitapumpan hjá Mitsubishi komin til Føroyar!
Við einum COP á 5,33 og einum hitaevni á heili 6,3 KW
• Serligt tøkni frá Mitsubishi electric
• Hitakapasitet á 1,5 upp til 6,3 KW
• COP á 5,33
• Sera still bert 20 dB. (stillasta á marknaðinum)
• Driftssikkur við lágan temperatur
• I-See sensor. Hesin leiðir hitan har tørvur er
• Reina og sunna luft við Plasma Duo Filtur
• Orkusparandi avrímingartøkni
• Nýggjan serligan kompressara
• Umhvørvisvinarligan kølimiðal
Serligt tøkni ger at pumpan gevur hita heilt niður til minus 15-25 gradir
20 dB(A)
Hitaorka (kw)
Uttandura hiti
Um dagin
Heitari luft verður send á kalda økið
Heitt økið
Um kvøldið
Heitari luft verður send á kalda økið
Kalt økið
Bert
15.900,-
v/ uppsetan
Demich P/F, Tórshavn
Postboks 378 - Stiðjagøta 2
Telefon +298 309 310
Fax + 298 309 311
Demich P/F, Vágur
Marknoyrarvegur 36
Telefon +298 373 535
Fax + 298 373 565
Demich P/F, Saltangará
Heiðavegur 80
Telefon +298 444 500
Fax + 298 445 501
demich@demich.fo • www.demich.fo
MITSUBISHI ELECTRIC
Changes for the Better



Tú ert handverkarin!
... og vit hava eitt spennandi arbeiðspláss til tín
Vit kunnu bjóða
• spennandi arbeiðsuppgávur
• ein fjølbroyttan og áhugaverdan gerandisdag
• starvsfólkamenning
• trivnað
Hevur hetta tín áhuga, ring so til okkara ella send okkum eitt teldubræv
SENDISTOVAN
ELECTRIC
Hoyvíksvegur 53 100 Tórshavn Tel 351220 Fax 351230 lm@lm.fo www.lm.fo
LM Electric bjóðar heildarveiting innan el-innlegging, ráðgeving og projektering
· El-innleggingar · Ljós og talvur · EDV-& telefonnet · Neyðstreymsskipanir (no-break og diesel)
· Trygdarskipanir (ABA, ITV, AIA og ADK) · Hvítvøruservice
Døgntænastan svarar altíð á tel 35 12 20

# Nær er kommunala brennistøðin opin?

Skriva **rusk** í einum sms
og send til **28 50 00**

Tú fært svar beinanvegin!



**Tórshavnar kommuna**






**Fá tær realkredittlán** frá okkum og slepp undan at hugsa um rentuhækkingar

www.eik.fo


Ídnaðar- og garaguhurðar
Spyr fyrst hjá okkum: tlf. 31 99 92
Sp/f. Tórshavnar Maskinverkstaður
Vestara bryggja - Box 3135 - FO 110 Tórshavn

Nýtið bara bestu útgerð umborð á føroyskum fiskiførum
VARTA
Battariir Til Øll Endamál
Fartelifonir
Hoyri Apparatir
Ur og mangt annað
Eisini hava vit øll vanlig battariir
Heil- og smásøla, landsins bestu battariir, og landsins bestu prísir
POLAR

elmek
v/Magnus Magnussen · Gripsvegur 18 · FO-100 Tórshavn
tel 317352 · fax 217700 · elmek@post.olivant.fo
Alt el- og edvarbeiði verður gjørt skjótt og væl


Hvussu nógv
fært tú útgoldið
Ú-dagin?
** Kr. 3.176,00 ****
Upphæddin á myndini er vegleiðandi
Savna tínar tryggingar og pensjón hjá okkum - og fá útgoldið 20% av tínum tryggingum. Tað kann lættliga gerast fleiri túsund krónur um árið.
Ring til okkara á 345 600 ella send okkum ein SMS til 1919 og skriva "ring" og vit ringja aftur til tín. Les meira á www.u-dagur.fo
Ú-DAGUR
22
JANUAR 2010
Gleð teg til Ú-dagin
Betri pensjón
TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari
sansir.fo




Við Flags kanst tú flagsa á netinum við tíni fartelefon. Tú kanst lesa og skriva teldupost, lesa tíðindi, vera á Facebook og msn og gera alt tað, tú vanliga ger á netinum. Vit bjóða serligar Flags-pakkar, sum ger tað uppaftur lættari og bíligari at vera á.
**Bílegg Flagspakkar við at senda sms boð til 1441.**
**Fá meira at vita á www.ft.fo**

**SilvurFlags**
Mánaðargjald: 50 kr.
Íroknað 15 Mb download hvønn mánað
Kostnaður eftir 15 Mb: kr. 5,00/Mb
**Bílegg: Send "SilvurFlags" til 1441**

**GullFlags**
Mánaðargjald: 150 kr.
Íroknað 100 Mb download hvønn mánað
Kostnaður eftir 100 Mb: kr. 3,00/Mb
**Bílegg: Send "GullFlags" til 1441**

facebook bwin.com myspace.com a place for friends FLAGS

FØROYA TELE